# Bundið er søguleyst fólk

ÓLUVA KLETTSKARÐ



**Nú søgu- og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya kennir sviðan av fíggjarpolitikki og fíggjarkreppu, fari eg at heita á Helunu Dam á Neystabø um at bera so í bandi, at henda deild í stundini kemur aftur at virka**

**Søga er fortíð, men eisini framtíð**

Onki samfelag hevur ráð til at vera eina søgu- og samfelagsdeild fyri uttan. Og als ikki Føroyar. Vit eru í ríkisfelagsskapi við tveimum øðrum tjóðum, ið hava sera fá sereyðkenni í felag, kanska bert søguna. At halda, vit kunnu lata søgu- og samfelagskunnleika okkara upp í hendurnar á útlendskari vitan er púra burturvið.

Grundkjarnin í søgufakinum er at fata fortíðina, samtíðina og framtíðina í einum tíðarperspektivi. Borgarin eigur og skal gerast kritiskur medborgari og taka lut í kjaki og samfelagsmenning. Moralska fatanin av søguni er konstant og altíð neyðug. Hon broytist og skal gevast ans hvønn dag.

Søguligi kunnleiki er ikki ein kollektiv fatan av ímyndum, munnligum frásagnum ella egnum upplivingum. Felags søga verður bert til umvegis fakliga vitan og gransking. Til tess at skilja samfelag, menning og gongd krevst henda vitan. Og til tess at vinna á snævurskygni, rongum ímyndum og populismu hevur eitthvørt samfelag í menning brúk fyri hollari fakligari vitan.

**At beina kunnleika burtur**

Søgan er neyðug, hon er sálin í fólkinum. Umvegis søgu- og samfelagslæru mennist menniskjað til at gerast tilvitaður og demokratiskur borgari. Tað føroyska samfelagið hevur ikki brúk fyri intoleransu, snævurskygdum fatanum ella isoleraðum livihátti, tvørturímóti. Vit mugu sjálv sæta okkum heima eins og í altjóða høpi.

Við sereyðkennum og serligu umstøðum okkara, uttan nakran veruligan javnsettan ella einsháttaðan part í øllum heiminum, eiga vit og bara vit at taka ábyrgd av mentanararvi okkara og søgu okkara –ongin annar skal gera tað! At vita hvaðan vit stava, hvørji vit eru og til tess at skilja hvagar vit fara er søgu- og samfelagsfrøðin tann, sum í stóran mun kann koma við svarinum. At leggja niður søgu- og samfelagsdeildina er tískil at burturbeina týdningarmiklan kunnleika, eisini um tað bert er fyri eina tíð.

Vit eru í løtuni um at lata sera nógv virðir av hondum okkara, um vit ikki taka kunnleikan í egnar hendur, sum vit hava gjørt í nógv ár, síðan Hans Jacob Debes, sáli, tók stór tøk til at skapa søgu okkara virðiligar umstøður og ikki bert lata hana fyri vág og vind. At síggja søgu og samfelag við egnum eygum og alheimin úr tí sjónarhorninum er sjálvsagdur rættur hjá øllum tjóðum. Hjá okkum er langt eftir á mál, skulu vit samanbera okkum við støði í hinum norðurlondunum, bæði í skúlan og millum manna. Men hvønn dag megna vit at stríða okkum eitt lítið sindur longur fram á mál.

**Virðið arvin og nútíðina**

Landsstýriskvinna í mentamálum og tingið alt: bjargið søgu okkara undan at gerast ein kastibløka, sum í grundini er at vanvirða bæði land og fólk. Virðið egnu vallyftir tykkara um at verja mentan og gransking. Og latið hesi ungu fólk fáa ta virðing, at tey tóku rætta avgerð, tá tey valdu at skapa sær eina framtíð í Føroyum. At tey gjørdu rætt at nema sær kunnleika og innlit í heimsins viðurskifti umvegis egna vindeyga okkara, ið lítur inneftir og úteftir.

# Viðmerkingar til starvið sum sjúkrarøktarstjóri

Gjøgnum fjølmiðlarnar fáa vit at vita, at landsstýrismaðurin, hevur tikið avgerð um, at ongin sjúkrarøktarstjóri skal setast í verandi starvið á Landssjúkrahúsinum. Í staðin skal annar sjúkrarøktarfrøðingur røkja hetta starvið afturat sínum egna. Givna grundin er, at "ongin" fer at søkja starvið.

Vit undrast, hví landsstýrismaðurin hevur valt at gera ein fyribilsbygnað, sum hevur so álvarsligar fylgjur fyri ein fakbólk, uttan at taka allar partar við í arbeiðið. Tann, sum hevur innlit í ástøði um organisatiónskultur, veit, at slíkur framferðarháttur kann føra til stríð. Mótstøða móti t.d. bygnaðarbroytingum kann linkast betýðiligt, um starvsbólkurin verður tikin við í arbeiði frá byrjan.

Tá tað er sagt, so kann eisini verða spurt, hvussu viðkomandi, sum hevur fingið hetta starv í boði skal kunna røkja hetta sera arbeiðskrevjandi starvið afturat sínum egna.

Nógvar granskingargreinar staðfesta týdningin av at sjúkrarøktin er við í toppleiðsluni. Tað hevur positivt árin á kvalitetin í sjúklingagongdunum, t.d. við øktari nýtslu av evidensbaseraðari røkt og viðgerð, við øktari sjúklingatrygd, øktum sjúklinga- og starvsfólkanøgdsemi, øktari starvsfólkamenning og fasthaldan av starvsfólkum.

Hesar staðfestingar hava ført til, at Joint Commission of Accreditation í 2007 setti sum kriterii fyri akkreditering av sjúkrahúsum, at sjúkrahúsið hevur ein sjúkrarøktarfakligan leiðara í toppleiðsluni, væl at merkja ein leiðara, sum "assumes an active leadership role with the organization's governing body, management, organized medical staff, and clinical leaders in the organization's decision-making structures and process". (The Joint Commission. Hospital Accreditation Standards. Oakbrook Terrace, Ill: Joint Commission; 2007). Sum vit skilja hesar reglur, so kann hetta starvið sum sjúkrarøktarfakligur leiðari í toppleiðsluni als ikki røkjast forsvarliga við síðuna av einum øðrum starvi.

Tá Joint Commission hevur sett hetta sum kriterii fyri akkreditering av sjúkrahúsum, so vildi tað verið náttúrligt, at tikið hetta við, tá støða skal takast viðvíkjandi nýggjum sjúkrahúsbygnaði. Tí tann tíð man ikki vera so langt burturi, at eisini føroyska sjúkrahúsverkið fer at hava tørv á akkreditering.

Til frama fyri bæði sjúklingar, avvarðandi, starvsfólk og samfelagið alt skulu okkara ráð til landsstýrismannin tí vera at lýsa eftir sjúkrarøktarstjóra beinanvegin. So kann hesin vera við í arbeiðnum við bygnaðarbroytingum saman við felagnum og øðrum góðum fólki, sum øll ynskja heimsins besta heilsuverk.

Við hávirðing

**Lærarar á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum**

## Argjamyndaframsýning

Ætlanin er at hava eina framsýning við argjamyndum og øðrum, sum hevur við Argir at gera, í Róðrarneystinum á Argjum á páskum.

Um onkur hevur myndir (gamlar ella nýggjari) ella okkurt annað forkunnugt at lata til framsýningina, so ber til at fara út í Andrasarstovu (úti í støðni) við navnamerktum tilfari mánadagin, týsdagin og mikudagin millum klokkan 13 og 17.

Annars ber til at ringja til: BOGA (tlf. 224960) ella EYÐUN (tlf. 259222) mánakvøldið 6/4, týskvøldið 7/4 og mikukvøldið 8/4 frá kl. 17-19.

**Við argjakvøðu Fyrireikingarbólkurin**

# Undir hámessuni eru øll líka

JOHN S. MYLLHAMAR



Nú ein sunnumorgun, tá ið eg kom úr kirkju, hoyrdi eg guðstænastu í Kringvarpinum og legði merkið til, at kirkjuliðið - ella nøkur í tí - góvu kórinum bifald undir guðstænastuni. Kom at hugsa um, hvussu lítið fólk vita um, hvat ein guðstænasta er, at tey halda hana vera ein sjónleikur, ein fundur, ella eitt amerikanskt møti, hvar eitt publikum er møtt upp til undirhalds.

Ein hámessa er nakað heilt annað. Hon er ein heild, og tí kann eingin ávísur bólkur av fólki, sum er í kirkju, vera upphevjaður við lógvabrestum fram um onnur, ið sita har. Kirkjuliðið er ein eind og ein heild, tí øll gera sítt til, at vit kunnu hava guðstænastu. Á tann hátt er týdningurin hjá tí, sum situr í beinkinum og syngur, eins stórur og tann hjá prestinum, sum prædikar. Tað verður eingin guðstænasta, um eingin situr á kirkjubeinkinum, eins og tað heldur ikki verður nøkur guðstænasta um eingin er innari í kóri. Bæði skulu til. Tí er tað meiningsleyst, at nøkur fá, sum eru í kirkju, verða fagnaði fyri teirra avrik undir guðstænastuni.

# Uppsagnir á Vinnuháskúlanum

Í loftmiðlunum undan samráðnum, sum var 25. februar, søgdu skúlastjórin og landsstýriskvinnan, at sparingarnar á Vinnuháskúlanum, sum Fíggjarnevndin/Løgtingi hevði framt, var beinleiðis orsøkin til:

- at leiðslan á skúlanum hevði sæð seg noyddan til at siga trimum royndum lærarum á skúlanum upp, tí skúlin skuldi spara 2,2 mió. kr.
- at maskinistaútbúgvingin ikki kundi byrja í august, og
- at bachelor útbúgvingin mátti útsetast til 2010

Alt hetta varð tó afturvíst í samráðnum. Har fáa vit at vita, at orsøkin til sparingarnar er, at ov nógvir lærarar verða á Vinnuháskúlanum aftaná 1. august í ár, og tí er er neyðugt við uppsagnum.

Orsøkin til ov høga læraratalið var m.a. rasjonaliseringar, sum leiðslan hevði staðið fyri. Og var tað serliga samlestur av lærugreinum, sum gjørdist møguligt, tá skúlarnir vórðu lagdir saman, sum eru orsøk til hesar rasjonaliseringar.

Hóast hesa kunning og niðurstøðu verður aftaná samráðið róð framundir, at tað kortini er fíggjarlógin/Fíggjarnevndin, sum er orsøk til uppsagnirnar á Vinnuháskúlanum, tí játtanin á fíggjarlógini til lønir er so lág. Við hesum í huga ynskir Fíggjarnevndin tí at gera soljóðandi frágreiðing um fíggjarlógartilgongdina:

At játtanin til lønir á Vinnuháskúlanum er komin niður á 12,8 mió. kr., er eitt úrslit, sum er íkomið aftaná, at Løgtingið hevur gjørt sína samtykt.

Tá fíggjarlógin varð løgd fyri Løgtingið, var í uppskoti, at Vinnuháskúlanum skuldi játtast 20,6 mió. kr., herav 16,2 mió. kr. skuldu játtast til lønir. Havandi í huga, at lønarnýtslan í 2008 fór at verða um 12,6 mió. kr, og at ongar ætlanir vóru um økt virksemi á skúlanum. –heldur tvørturímóti, sá Fíggjarnevndin onga osøk til at hækka játtanina til lønir úr 12,6 mió. kr upp í 16,2 mió. kr. Fíggjarnevndin valdi tí at lækka umbidna vøksturin við uml 2,2 mió. kr. (úr 16,2 mió. kr, sum Mentamálaráðið bað um, niður í góðar 14 mió. kr.) Hetta gera vit, tí framskrivingar vístu, at tørvur var ikki á teimum 16,2 mió. kr. til lønir, sum Mentamálaráðið hevði biðið um. Men tá Mentamálaráðið nú fær góðar 14 mió kr. heldur enn 16,2 mió. kr., koma tey til, at 14 mió. kr. er eisini ov nógv! So ger Mentamálaráðið (saman við leiðsluni á Vinnuháskúlanum, mugu vit ganga út frá) av at skarva 1,2 mió. kr meira av lønarjáttanini. Tí endaði talið niðri á 12,873 mió. kr. Hvat hesar 1,2 mió. kr skulu brúkast til, vita vit ikki, men tær eru fluttar frá lønum yvir til keyp av vørum og tænastum.

Eftir stendur, at tað er Mentamálaráðið og leiðsla skúlans, sum hava tryggjað sær, at lønarpuljan á fíggjarlógini fer úr góðum 14 mió. kr. niður í 12,873 mió. kr., og tað er eisini í lagi, um tað ikki er tørvur á hægri játtan. Men talan er um eina lækking í lønum, sum Mentamálaráðið í samráð við Vinnuháskúlan hevur broderað seg fram til uttan um Fíggjarnevnd og Løgting.

*Anfinn Kallsberg*
*Eyðgunn Samuelsen*
*Bjørn Kalsø*
*Tórbjørn JacobsenBill*
*Justinussen*
*Magni Laksáfoss*
*Annita á Fríðriksmørk*